# Hósdagur 20. desember

**SVF**

18.25 DV í kvøld
18.30 Glóa 10:13 (e)
19.15 Tað síðsta klippið (e)
20.00 Dagur og Vika við Magn
20.45 Ally McBeal 17 – amerikonsk røð
21.30 Airport – úr Heathrow floghavn
21.55 Krimitímin: Mrs. Bradley-gáturnar 4:4
22.50 Kvinnur í kríggi – avstralsk dokumentarsending
23.45 Liðugt

**EUROSPORT**

7.30 Olympic Games - Olympic Magazine
8.30 Car Racing - Automagazine
9.00 Alpine Skiing - Men's World Cup - Live
10.00 Biathlon - World Cup - Live
11.30 Alpine Skiing - Men's World Cup
12.00 Alpine Skiing - Men's World Cup - Live
13.00 Equestrianism - Show Jumping
14.00 Football - Kick In Action Groups
14.30 Alpine Skiing - Men's World Cup
15.30 Biathlon - World Cup
16.30 Skeleton - World Cup - Live
17.30 Skeleton - World Cup - Live
18.30 Tennis - Who's that Girl? – Exclusive Interview with Anna Kournikova
19.00 Football - Champions League Classics
20.00 Football - Champions League Classics
21.00 Equestrianism - Olympia International Show Jumping Championships - Live
22.00 News
22.15 Football - One World/One Cup
23.15 Sumo - Grand Sumo Tournament
0.15 News
0.30 Close

**BBC PRIME**

0.05 TLZ: »The Return of Zog«
1.00 TLZ: »Future Fantastic – I, Robot«
2.00 TLZ: »Playing Safe«
2.30 TLZ: »The Museum of Modern Art«
2.55 TLZ: »Pause«
3.00 TLZ: »Cinema for the Ears«
3.25 TLZ: »Cyberart«
3.30 TLZ: »A Thread of Quicksilver«
4.00 TLZ: »Troubleshooter – Swallowing the Pill«
4.40 Shakespeare Shorts – Romeo and Juliet«
5.00 TLZ: »Greek Language and People – Let's have a Look«
5.30 Muzzy Comes Back
6.00 Bodger and Badger: »Mashy Record Breakers«
6.15 Playdays: »The Playground Stop – String Things«
6.35 Steps to the Stars
7.00 Ready Steady Cook
7.30 Garden Invaders: »West Derby«
8.00 House Invaders: »Halifax«
8.30 Bargain Hunt
9.00 Battersea Dogs Home
9.30 Vets In the Wild
10.15 The Weakest Link
11.00 Doctor Who: »The Two Doctors«
11.30 Doctors
12.00 Eastenders
12.30 Hetty Wainthropp Investigates: »Fisticuffs«
13.45 Ready Steady Cook
14.15 Bodger and Badger: »Mashy Record Breakers«
14.30 Playdays: »The Playground Stop – String Things«
14.50 Steps to the Stars
15.15 TOTP Eurochart
15.45 The Naked Chef: »Chef's Night Out«
16.15 Ground Force: »Cambridge«
16.45 Miss Marple: »At Bertram's Hotel«
17.45 The Weakest Link
18.30 Doctors
19.00 Eastenders
19.30 Murder Most Horrid: »Mangez Merveillac«
20.00 Dalziel and Pascoe: »The Wood Beyond«
21.00 A Bit of Fry and Laurie
21.30 Ten Thousand Private Eyes
23.00 Casualty

**BBC WORLD**

0.00 BBC News followed by Weather
0.30 HARDtalk (r)
1.00 BBC News followed by Weather
1.30 World News Tonight
2.00 BBC News followed by Weather
2.30 Talking Movies (r)
3.00 BBC News followed by Weather
3.30 Asia Today (r)
3.45 World Business Report (r)
4.00 BBC News followed by Weather
4.30 HARDtalk
5.00 BBC News followed by Weather
5.30 World Business Report
6.00 BBC News followed by Weather
6.30 World Business Report
7.00 BBC News followed by Weather
7.30 World Business Report
7.45 Sport Today
8.00 BBC News followed by Weather
8.30 HARDtalk (r)
9.00 BBC News followed by Weather
9.30 Talking Movies (r)
10.00 BBC News followed by Weather
10.30 Simpson's World (r)
11.00 BBC News followed by Weather
11.30 HARDtalk (r)
12.00 BBC News followed by Weather
12.30 World Business Report
12.45 Sport Today
13.00 BBC News followed by Weather
14.00 BBC News followed by Weather
14.30 Simpson's World (r)
15.00 BBC News followed by Weather
15.30 Asia Today
16.00 BBC News
16.30 HARDtalk (r)
17.00 BBC News
17.30 World Business Report followed by Weather
17.45 BBC News followed by Weather
18.30 World Business Report
18.45 Sport Today
19.00 BBC News followed by Weather
19.30 HARDtalk (r)
20.00 BBC News followed by Weather
20.30 Simpson's World (r)
21.00 BBC News followed by Weather
21.30 World Business Report
22.00 BBC News followed by Weather
22.30 Click Online
23.00 BBC News followed by Weather
23.30 World Business Report (r)
23.45 Asia Today

**TV 3**

5.00 Børne-hjørnet med Disney
7.10 TV-shop
8.00 Herkules – de unge år
8.25 Ricki Lake (G)
9.15 Ricki Lake
10.10 Horton-sagaen (G)
11.00 Horton-sagaen
11.50 Panter-tanter
12.20 Vild med dig
12.50 Pæn pige – sej sild
13.15 Baywatch Hawaii (G)
14.10 Charlie`s Angels
15.10 Min kære familie
15.40 Baywatch Hawaii
16.35 Ricki Lake
17.30 Med på moden
18.00 Sabrina - skolens heks
18.30 Alle tiders barnepige
19.00 Gitte og Camilla i sneen
19.30 My Girl
21.30 Tve-kampen VIP
22.35 Vore værste år
23.05 Simpsons
23.35 Nash Bridges
0.35 Ricki Lake (G)
1.30 Drøm videre
2.00 Vore værste år (G)
2.30 Dilbert
2.55 Sunset Beach
3.40 Godnat

**ÚF**

7.00 Tíðindir
7.05 Morgunlestur - Bernhardina Mikkelsen í Fuglafirði lesur
7.15 Jólaløtan - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættisr
7.30 Tíðindir
7.35 Morgunrásin - Bjarni Mohr og Hilmar Jan Hansen leggja til rættisr
8.00 Tíðindir
8.03 Morgunrásinr
9.00 Tíðindir
9.03 Sjónarringurin (e) - Árni Joensen leggur til rættisr
9.35 Dagsins tónar
9.50 Morgunlestur (e) - Bernhardina Mikkelsen í Fuglafirði lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 2
10.10 Tit skriva, vit spæla - Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e) - Gunnvør Poulsen leggur til rættis
11.35 Undir døgurða
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e) - Helgi Jacobsen leggur til rættis
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt - Tróndur Vatnhamar velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Bitar úr Billboard - Rúni Jákupsson stílar fyri
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum - Alexander Samuelsen stílar fyri
18.00 Jólaløtan (e) - Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini
19.00 Skiftissiðir á lívsleiðini: - So siga vit hvør øðrum farvæl. Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo - Kári Olsen stílar fyri
20.30 Framhaldssøga
21.00 Tíðindi
21.05 Dagsetur - Øssur Egholm leggur til rættis
22.00 Ljóðmúrurin - Regin Egholm skipar fyri
23.00 Tíðindi

**Rás 2**

9.45 Orðið - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 Leysaløtan (e) - Endursending frá í gjár - Innsløg, prát og tónleikur - Sonne Smith og Sunneva Petersen leggja til rættis
11.00 Politisk sending (e) - Endursending frá týsdegnum - Hesaferð við Miðflokkinum
12.00 Tíðindi og kunngerðir
12.15 Tónleikur
13.00 Ynskiløtan - Heilsur frá lurtarum - Sunneva Petersen er vertur - Send heilsur um (www.ras2.fo) ella á fax. 359990
14.00 Lýsingar
14.05 Ynskiløtan (framhald)
15.00 Tíðindi og kunngerðir
15.15 Norðlýsið - Víðka sending við skemti og aktuellum tilfarið úr Studio 7 í Klaksvík - John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18.00 Tíðindi og kunngerðir
18.15 Tónleikur
19.00 Orð á leiðini (EvR) - Endatíðin: »Fyrigeving millum menniskju« - Jógvan Zachariassen leggur til rættis
19.40 Tónleikur
21.00 Tíðindi og kunngerðir
21.15 Orðið (e) - Endursending frá í morgun - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 Tónleikur
22.00 Girlzone - Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri - Telefon: 359993 Fax: 359990 E-mail: girlzone@ras2.fo
0.00 Liðugt

**Lindin**

9.00 Byrjan - Dagsskráin verður lisin
9.15 Okkara dagliga breyð
10.00 Søga úr »Jólastjørnuni« frá 1940–50. Hjørdis Petersen lesur
11.00 Jólasending v/ M.C. Restorff, um jólatónleik
12.00 »Himmalin« eftir D. L. Moody
13.00 Dagsskráin verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ Símun Hansen (e)
14.30 Jólatónleikur
15.00 Horizon Star v/ Stellu Zachariassen (e)
17.15 »Jólafjas« barnajólasending v/ Stellu Zachariassen
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
20.00 Søga úr »Jólastjørnuni« frá 1940–50 (e)
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Lýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum
20.55 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti (e)
21.00 Bønarlinjan, beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana - Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379
Vit gevast uml. midnátt

## Skiftissiðir á lívsleiðini

**ÚF Hóskvøldið kl. 19.00**

Í síðstu sending í røðini um skiftissiðir á lívsleiðini eru vit komin til deyðan. Hans Jacob Joensen biskupur og presturin Heri Joensen siga frá ymiskum siðum, sum eru tengdir at deyða og jarðarferð.

Eisini sigur ein kvinna frá, hvussu hon eftir hava fingið viðgerð fyri krabbamein, gjørdi av, hvørt ár at gera nógv burtur úr sínum føðingardegi. Hon segði krabbameini og deyða farvæl og heilsar heldur føðingardegnum og lívinum.

## Kvinnur í kríggi

**SVF Hóskvøldið kl. 22.50**

– Avstralsk dokumentarsending

Í Vietnamkrígnum í sjeytiárunum vóru tær vietnamesisku kvinnurnar av álvara uppi í – eisini sum hermenn. Kríggj var fyri menn, men tær vietnamesisku kvinnurnar stóðu ikki aftan fyri í bardaganum fyri frælsi. Í sendingini siga nakrar av hesum kvinnunum sínar søgur frá krígnum.

## Hon er aftur!

### Anna Kournikova



**EUROSPORT Hóskvøldið kl. 18.30**

Eftir ein átta mánaða steðg síðani síðsta februar, tá hon hevði eitt brot í vinstra fóti, arbeiðir hon nú hart við at byrja aftur.

Á Zurich WTA Tournament møtti Europsport Onnu Kournikova. Tey tosa um lív hennara, karrieruna, afturvendan hennara, hennara ímynd og hví ár 2000 fer at vera hennara ár.

Anna Kournikova byrjaði sum professionellur tennisleikari fyri nærum fimm árum síðani. Hon megnaði at halda seg á topp 10 listanum fyri single og vann Grand Slam Double í 1999 í Australian Open saman við Martinu Hingis.

## ÚF Morgunlestrar

**17.–22. desember**

***Bernhardina Mikkelsen í Fuglafirði lesur***

**Sálmar og skriftstøð:**

**Mánadagin 17. desember:**
nr. 86 Ger beinar Harrans leiðir
Matt. 21,5
nr. 90 Upp, gleðist allir

**Týsdagin 18. desember:**
nr. 517 Hvat var Guðs jørð eitt fagnarstað
Áps. 3,19
nr. 405 Lat, o Guð, tín einglaskara

**Mikudagin 19. desember:**
nr. 559 Rís í Jesu navni nú
Hebr. 13,1 & 2

**Hósdagin 20. desember:**
nr. 127 Til okkum her á lágum støðum
Luk. 2,13 & 14
nr. 132 Føgur er foldin

**Fríggjadagin 21. desember:**
nr. 121 Signað skín rættlætis sólin
2. Kor. 8,9

**Leygardagin 22. desember:**
nr. 120 Mítt hjarta tilhald hevur
Jes. 9,6





*Ellisheimið, sum tað var upprunaliga*



*Ein summarmynd undir krígnum – tað síggja vit av sandsekkunum, sum eru lagaðir upp fyri vindeyguni í kjallarahæddini. Frá vinstru: Bernina úr Kollafirði, Elsba og Heini hjá Rubekki, Elsbelena av Hvítanesi, Maja Johannesen av Skála, Alexandra Christiansen av Skála, Sveinbjørn, Íslendingurin, Dortea hjá Múraranum, Kristianna Vang, Kalbaks Petur og aftan fyri hann Kristianna í Kaffistovu*



*Ebba, Astrid og Palma í uppihaldsstovuni á Ellisheiminum*

# Forvitnislig bók um Ellisheimið í Havn



*Jákup Lindenskov við bókini »Tíðarhvarv«, sum er um Ellisheimið í Havn, um upprunan og um fólkið har. Ellisheimið fylti 65 ár í august í fjør*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Jákup Lindenskov hevur skrivað áhugaverda bók um Ellisheimið í Havn, sum í fjør hevði 65 ár á baki. Í bókini ber eisini til at lesa um nógv fólk, í hava arbeitt ella búð á Ellisheiminum, um onnur fólk í Havn og um, hvørjar hugsanir menn gjørdu sær, og hvussu málið um ellisheimið at enda verður loyst**

BÓKAÚTGÁVA

*Jan Müller*

»Tá tey talaðu um ellisheim í tjúguárunum var einki av tílíkum í Føroyum, men føroyingurin fór eisini tá út um landoddarnar – og har sá hann, at heimurin broyttist.

Í 1927 hevði fotografurin, Elsa Petersen, testamenterað einum komandi Ellisheimi í Havn eina penganøgd.

Søgan um Ellisheimið í Havn setur eisini glæruna á glottar úr søguni – og sigur frá fólki, sum livdu og virkaðu. Tey, sum settu av sær tann førningin, vit fluttu víðari.

Tórshavnar Ellisheim lat upp dyrnar 15. august í 1935. Tað var ofta av samtíð síni hildin fremmandur fuglur at vera, sum ikki samsvaraði við korini hjá vanliga føroyinginum.

Søgan er eisini afturskinið av tí, sum var. Søgan um Ellisheimið í Havn er hin serstaka, aðrari ólík.«

Soleiðis hugleiðir Jákup Lindenskov, sum hevur savnað og skrivað bókina Tíðarhvarv, sum er um Ellisheimið í Havn, sum í fjør kundi hátíðarhalda 65 ára stovningardagin.

At høvundurin er fyrrverandi politikari, bæði í landsstýri, løgtingi og fólkatingi, sið serligum áhuga fyri sosialu viðurskiftunum, í meira enn ein mansaldur er uttan iva grundarlagið fyri vitan hansara um hetta evnið, sum neyvan hevði komið undan kavi, høvdu vit ikki fólk við kunnleika um viðurskiftini, sum eitt nú tað at skriva um rákið, ið førdi til, at heim varð bygt í Havn fyri gomul í kørgu árunum millum evropeisku stórkrígginí í farnu øld.

Málið í bókini er lætt. Høvundurin gevur okkum innlit í søguligu gongdina um evnið, sum eisini í løtuni er partur av samfelagskjakinum, týdninginum av at varða av okkara gomlu og teimum, ið tørva góðvild sum stuðul í gerandislívinum.

Frásagnirnar og dømini úr fornari tíð flyta okkum í farnu øld, tá samfelagsviðurskifti verða tættari ávirkað og knýtt at tí, sum hendir uttan um okkum. Brotið um tingviðgerðirnar av sosialu lógarmálunum í árunum millum heimskrígginí bera eisini ein boðskap til okkara. Vit hugsa neyvan stórvegis um ta ávirkan, tað sum hendir uttan um okkum veruliga hevur og hevur havt, og hvussu stórt afturhaldið mangan var, til vit tóku við tí nýggja og tí, sum bøtti korini hjá teimum mongu, sum sótu meira og minni við sviðu soð.

Vit fáa at vita, hvørjar hugsanir menn gjørdu sær, og hvussu málið um ellisheimið at enda verður loyst. Jákup Lindenskov hevði óivað kunna skrivað drúgvari um einstøku lutirnar. Málsviðrgerðin í býráðnum hevur óiva verið drúgvari, men tað bilar ikki, at okkurt kann koma undan kavi seinni. Eitt sindur nemur hann við katólsku tiltøkikni tá, í tjúgunum og tríatiárunum, sum óivað eisini skundaðu undir málið um ellisheimið. Tað er áhugavert, og tað sigur eisini frá rembinum vit kenna aftur, tá vit skeita aftur í katólska tíðarskeiðið hjá Bauer út í Rættará og um tann mótburð, hann fekk, av ókunnleika, fanatismu og erkvisni.

Tað merkist, at høvundurin er føddur og uppvaksin í umhvørvinum við Rættará. Vit fáa partvís søguna um tann spilta fossin. Vit fáa frásøgnina um læknan, Heerup, sum virkaði í mong ár í Føroyhum, hjúnini vóru bæði donsk. Søgnin, sum Liffa hjá Sigmundi á Argjum hevur sagt um hondina hjá Billu, sum gamla frú Danielsen lekti, hevur her fingið heiðurspláss, eisini lýsingin av Elsu Petersen, fotografinum, ið var ein íblásarin av Ellisheimsmálinum.

Í bókini er herumframt lýsing av »teimum hjá Rubeki«, har er vígslutalan hjá Jákup Dahl, prósti og prát við arbeiðskonur á Ellisheiminum, m. a. Idu Mørkøre, sum var fyrsta arbeiðskonan á Ellisheiminum. Hon er fødd 5. januar 1911. Eisini er yvirlit yvir fyristøðukvinnur og starvsfólk. Serligt yvirlit er við myndum yvir tey búfólk, sum vóru á Ellisheiminum 15. august 2000 saman við myndum av einstøku búfólkunum, tá heimið varð 65 ár.

Yvirlit er yvir búfólk á Ellisheiminum frá 1935, sum er greitt soleiðis, at nøvn, føðistaður og ár og deyðsdagur, skipað eftir tí ári, tey komu á Ellisheimið.